# Kunningarfundur um slaktigóðsku á alifiski

**Hálvthundrað fólk møttu á kunningarfundinum »Slaktigóðska á alifiski, sum Fiskaaling og EWOS skipaðu fyri í síðstu viku**

ALING
*Tíðindaskriv*

Týsdagin 22. juni boðaði Fiskaaling og EWOS til kunnningarfund við heitinum »Slaktigóðska á alifiski«. Vinnan tók sera væl undir við fundinum og møttu um 50 fólk frá so gott sum øllum alifyritøkunum í Føroyum. Hesin fundur var partur av verkætlan ið Fiskaaling arbeiðir við innan sama evni. Verkætlanin ber heitið »Góðska og strongd á alifiski frá ringi til slakt« og er hon ein samstarvsverkætlan millum PRG í Gøtu, Kryvjing í Klaksvík, Sørvágslaks í Sørvági og Fiskaaling. BP Amoco hevur fíggja verkætlanina.

Tað var serfrøðingurin Dave Robb frá EWOS innovation ið helt fundin. Dave hevur gjørt doktararitgerð innan slaktigóðsku og hevur drúgvar royndir innan hetta øki frá millum annað Kanada, Chile, Bretlandi og Noregi. Evnini sum vóru tikin upp á fundinum vóru dioxin í alifiski, vegetabilsk ráevni í alifóðri og hvørja ávirkan strongd og handfaring hava á góðskuna á flakinum. Tað var serliga hetta síðsta ið vigaði tungt á fundinum. Royndir vísa, at handfaring áðrenn slakt hevur stóra ávirkan á góðskuna á flakinum. Øktar vøddarørslur við tøku gera at fiskurin brúkar orkuna í hvítu vøddunum og fara vøddarnir yvir til at framleiða mjólkasýru. Hetta ger at pH'ið í vøddunum fellir. Stór broyting hevur negativa ávirkan á lit, spalting og fastleika á flakinum. Greitt varð frá, hvussu handfaringin frá ringi til slakt kundi gerast á ein hátt, ið er minni strongjandi fyri fiskin. Dave greiddi frá slóðbrótandi slaktilinju, sum hann hevði verið við til at ment í Skotlandi. Eisini varð lagt fram um blóðgilinjuna, ið Rógvi Nielsen hevur útviklað. Henda maskina hevur víst seg at hava sera góða ávirkan á bæði góðsku og umhvørvið.

Fundurin lýsti hvussu ein lítaleys tøkumannagongd kundi økja mundandi um góðskuna á føroyskum alifiski.





*Øll, ið ikki hava dagliga gongd og serligt id-kort, skulu nú spyrja vaktina um loyvi at sleppa inn á keiøkið á molanum. Her sæst búrið, ið vaktin framyvir fer at halda til í, tá mest trafikkur verður. Um næturnar og tá lítið av trafikki er, verður økið heilt einfalt stongt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Generalroynd á molanum

**Mikudagin 30. juni kemur eitt ferðafólkaskip á Havnina, og tað verður stóra generalroyndin til altjóða reglurnar, sum koma í gildi hósdagin 1. juli. Strongu reglurnar siga, at atløguøki, har ferðamanna- og farmaskip úr altjóða sjógvi leggja at, skulu avbyrgjast. Tískil verður molin nú stongdur. Av havnarskrivstovuni frættist, at alt er klárt**

ALTJÓÐA REGLUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit eru klárir til tíðina, staðfestir Jónsvein Lamhauge beinanvegin, tá hann verður spurdur um, hvussu tað gongst við fyrireikingunum á molanum. Altjóða reglurnar um, at øll atløguøki, ið taka ímóti ferðamanna- og farmaskipum úr altjóða sjógvi, skulu verða avbyrgd, koma nevniliga í gildi hósdagin 1. juli. Men lata borgararnir í Havnini sær lynda, at molin verður stongdur?

– Vit hava hoyrt okkurt lítið knarr frá ónøgdum havnarborgarnum, men tað hevur allíkavæl ikki verið nakað serligt. Tey spyrja hví vit noyðast at steingja molan heilt, men tá vit so greiða teimum frá, at hetta eru altjóða reglur, sum skulu tryggja ímóti yvirgangi, so skilja tey tað betur. Vit fáa heilt einfalt einki gjørt við tað, tí soleiðis eru reglurnar, sigur hann.

Jónsvein sigur víðari, at alt er komið uppá pláss, og at vakt verður sett á keiøkið frá mikudegnum 30. juni at rokna. Tey, sum arbeiða fyri skipafeløgini og trailaraførarar, sum mugu út á molan í arbeiðsørindum, hava øll fingið útflýggjað eitt idkort, sum gevur teimum atgongd til keiøkið. Onnur, sum ætla sær út higar, mugu tosa við vaktina fyrst.

Jónsvein sigur tó, at hegnið og vaktirnar ikki áttu at verið nøkur kollvelting fyri havnarborgarar.

– Tað hevur verið bannað at farið út á molan í langa tíð. Tað eiga øll at vita, sum duga at lesa skelti. So hóast altjóða reglurnar koma í gildi nú, so áttu hesi hegnini ikki at gjørt so stóran mun, sigur hann.

## Álvarsamt forboð

Á Havnarskrivstovuni eru teir noyddir at fylgja altjóða reglunum, men Jónsvein sigur, at teir ikki ætla sær at vera óneyðuga strangir.

– Vit vóna, at borgararnir fara at respektera forboðið, so hetta fer at ganga so væl sum gjørligt. Allarhelst fer tað at verða onkur smátrupulleiki, tí hetta er jú nýtt fyri øll, bæði arbeiðsfólkið á molanum, vaktirnar og okkum. Men nú taka vit mikudagin sum eina generalroynd, og so fáa vit at síggja hvussu tað gongur. Vit fáa eitt stórt ferðafólkaskip á Havnina tá, so tey koma at verða okkara fyrsta veruliga uppgáva. Øll eru sitt sindur ósikkur, men nú fáa vit at síggja hvussu tað verður, sigur Jónsvein. – Vit hava í øll førum alt tað praktiska upp á pláss.

Hann sigur, at allar havnirnar í Føroyum hava havt gott samstarv í sambandi við hesa reglugerðina. Tosað hevur verið um mannagongdir o.t., soleiðis, at allar føroyskar havnir bera seg at á sama hátt, tá altjóða skip leggja at.

– Vit hava umrøtt hvussu vit skulu uppføra okkum í ymsu støðunum, sum kunnu uppstanda. Um havnirnar ikki verða góðkendar, kann tað jú fáa álvarsamar fylgjur -bæði fyri havnina og skipini, sum leggja at. So vit vóna veruliga eisini, at borgararnir fara at taka hetta forboðið í álvara.

Jónsvein sigur, at um onkur ørindaleysur hóast alt fer sær ein túr inn á stongda økið, verður hetta sektað.

– Hetta er jú ein lóg, og brot á lógina kann meiri enn so viðføra at løgreglan kemur uppí leikin. Hetta forboðið má tí takast í størsta álvara, leggur hann at enda dent á.

# Stórt barnatiltak á Fjarðastevnu

BARNATILTAK
*Tíðindaskriv*

Fríggjakvøldið kl 19.00, verður stórt barnatiltak í Ítróttarhøllini í Vestmanna. Tað vera teir báðir Ásbjørn og Absalon, ið koma at undirhalda við gykli og búktaling.

Umframt tað koma Hans Michael og Finn at syngja barnasangir, har børnini sleppa at luttaka.

Hetta tiltak var á eisini á Norðoyastevnu, og hepnaðist tað sera væl. Nú fáa so børn og vaksin í miðstaðarøkinum, eisini møguleika fyri at uppliva hesa stuttligu og spennandi sýning.

Atgongumerki á 50kr fáast við dyrnar. Tiltakið er fyriskipa av VÍF.



# Lyfta arvin eftir Øssursson

**Havnar Jazzfelag skipar í hesum døgum fyri árliga Jazzfestivalinum. Hetta er fyrstu ferð í 20 ár, at slóðbrótarin innan føroyska jazz tónleik, Brandur Øssursson, ikki er høvuðsfyrireikari av festivalinum**

HAVNAR JAZZFESTIVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*









*Føroyski bólkurin, Tjant, verður at hoyra í Listaskálanum mikukvøldið. Bólkurin lat í fjør sína fyrstu fløgu úr hondum*

Mangir føroyskir jazzfjepparar stóðu í fjør spyrjandi, tá fyriskiparin av Tórshavnar Jazz, fólka og blues-festivalinum, Brandur Øssursson, valdi at stinga í sekkin og flyta av landinum. Slóðbrótarin innan føroyskan jazztónleik hevur skipað fyri Jazzfestivalinum síðan 1984, og framtíðin hjá festivalinum sá døpur út, tá høvuðsfyrireikarin seinastu 20 árini, Brandur Øssursson, takkaði fyri seg í fjør

Tónleikaáhuga kunnu kortini í hesum døgum fegnast um, at tað hevur eydnast limunum í Havnar Jazzfelag at fáa ein spennandi og áhugaverdan jazzfestival á føtur aftur í ár.

Alla vikuna til sunnukvøldið hava tónleikaáhuga ein gyltan møguleika at hoyra spennandi og fjølbroyttan tónleik í Havn.

## Fevnir breitt

Eins og undanfarin ár fevnir tónleikurin á jazzfestivalinum rættiliga breitt. Skráin er fjølbroytt, og talan er um fleiri ymiskar tónleikagreinar á jazzfestivalinum. Umframt fjølbroyttan jazztónleik, verður møguleiki at hoyra fólka, rokk, popp, funk og bluestónleik á festivalinum.

Av spennandi útlendskum nøvnunum kunnu nevnast danski bólkurin New Jungle Orchestra og U.L.C. Føroyingar eru væl umboðaðir á jazzfestivalinum í ár. Tað hevur eydnast fyrireikarunum at savna nostalgisku Kræklingarnar saman aftur, og millum onnur føroysk nøvn kunnu nevnast Enekk, Eivør Pálsdóttir, Høgni Lisberg, Headache Blues Treo, Tjant, Sigrid Rasmussen og Gunnar Guttesen, Hanus G. Johansen og Búi Dam Quintett.

## Meira fólksligt

Fyrireikararnir av Havnar Jazzfestivali siga, at teir í ár hava lagt seg eftir at fáa tónleikin so langt út til áhoyrarnar sum gjørligt, sum teir málbera seg. Konsertirnar eru ikki bara í Norðurlandahúsinum, men eisini á Listaskálanum, Sjónleikarhúsinum, á smærri spælistøðum í Havn og í gongugøtunum longur

Fyrireikararnir siga, at tað er ein stórur munur hjá tónleikarum at spæla í eitt nú Norðurlandahúsinum og á Café Natúr.

– Spælir tú eina konsert er tónleikurin skipaður í odd og egg. Á eini café er alt meira leyst, og tónleikararnir hava betri møguleikar at taka sær av løttum, fortelja Ólavur Olsen og Heðin Ziska Davidsen, tveir av fyrireikarunum av Havnar Jazzfestivali.

## Grottotúrar

Á jazzfestivalinum fáa áhoyrarar ein forkunnugan møguleika at hoyra tónleikin framførdan á ein heldur øðrvísi hátt. Í gjár, hósdagin og sunnudagin verður skipað fyri sonevndum grottotúrum út í Hest.

Talan er um ein fimm tíma langan túr við Norðlýsinum, har eitt av útlendsku nøvninum á festivalinum framførir sín tónleik. Hósdagin og sunnudagin spæla ávikavist New Jungle trio og Anders Fagberg. Báðar dagarnar verður loyst frá landi klokkan 13, og túrurin verður til klokkan 18.

## Tilgongd

Fyrireikingar á Havnar Jazztónleiki lata væl at støðuni hjá føroyskum jazztónleiki í løtuni. Seinasta árið eru fleiri frálíkir jazztónleikarar lagdir afturat teimum í Føroyum, og tað hevur økt um møguleikarnar hjá jazztónleikinum í Føroyum.

Millum nøvnini, ið seinnu árini hava verið búsitandi uttanlands, men farna árið hava vent nøsina heimaftur, kunnu nevnast, Arnold Ludvig, Brandur Jacobsen og Ólavur Olsen.

Meira fæst at vita um jazzfestivalin á www.havnarjazzfestival.-com



*Uni R. Debess, Edvard N. Debess og Rógvi á Rógvu manna bólkin, Headache Blues Treo, sum seinasta árið hevur verið sera virkin. Headache Blues Treo verður at hoyra á Havnar Jazzfestival í ár*



*Limirnir í Kræklingum vóru við at stovna Havnar Jazzfelag í 1975. Bólkurin eru nostalgiska ísletti á festivalinum í ár*

## Brot úr skránni fyri Havnar Jazzfestival

**Týsdagur 29.juni**
**Grotto kl. 13-18:**
Kannaste Ojajarvi Quartet

**Niels Finsensgøta kl. 15:**
Búi Dam Quintett feat. Kári Sverrisson
Nicholas Hill and The Universals

**Norðurlandahúsið kl. 19.30:**
Enekk
Spælimenninir
Eivør Pálsdóttir
New Jungle Orchestra
Kannaste Ojajarvi Quartet

**Mikudagin 30. juni**
**Niels Finsensgøta kl. 15:**
Kræklingar

**Listaskálin kl. 19:**
Hans Petur Kvintett
Tjant
Tómas R. Einarsson

**Hósdagin 1. juli**
**Grotto kl. 13-18:**
New Jungle Trio

**Niels Finsensgøta kl. 15:**
SAMBA-nds-MENN

**Sjónleikarhúsið kl. 19:**
RUN
Hanus G. Johansen
Nicholas Hill and The Universals

**Fríggjadagin 2. juli**
**Niels Finsensgøta kl. 15**
Tórshavnar Big Band
Føroya Klarinettorkestur

**Sjónleikarhúsið kl. 19**
U.L.C. Kvintett
Høgni Lisberg Band
Búi Dam Quintett feat. Kári Sverrisson

**Leygardagin 3. juli**
**Niels Finsensgøta kl. 15**
Høgni Lisberg

**Sjónleikarhúsið kl. 19**
Tórshavnar Big Band
Mega Tsunami
Gó Gó Blús
Lena Andersen, James Olsen og Arnold Ludvig Trio

**Sunnudagin 4. juli**
Grotto kl. 13-18
Anders Hagberg

**Listaskálin kl. 16**
Sigrid Rasmussen og Gunnar Guttesen